Hóast vit øll hildu tað, so er

— Botnurin ikki rokkin enn

hjá fólkaflokkinum og málgagni hansara

Satt at siga, so helt eg at O. J. Rólantsson og Óli Breckmann vóru komnir á botn í politsku kloakkini á Traðarvegnum. So er tíverri ikki.

Í skrivandi stund hava hesir báðir feðgarnir ábyrgdina av blaðnum hjá størsta politiska flokki her á landi. Seinasta avreksverk teirra er, at teir brúka eitt fýra ára gamalt telex til at hunddálka navngivnar persónar, hetta vísir okkum einaferð enn muruna í feðgunum á Traðarvegnum.

Nú er tað ikki nakað nýtt, at Dagblaðsblaðstjórin og fulltrúi hansara í sini sjúkligu politisku herferð serliga hava lagt eftir suðringum. Orsøkin til tað er at menniskjafiggindaligi politikkur teirra hevur ikki vunnið frama har í oynni. Sostatt er tað í stóran mun suðringum fyri at takka, at størsti politiski haturspennur í Føroya søgu onga sum helst ávirkan hevur, og vónandi heldur ikki í framtíðini fer at fáa á politisku viðurskiftini í Føroyum.

Tann óndsinnaða skrivingin, sum Dagblaðsblaðstjórin og fulltrúi hansara varta upp við á forsíðu Dagblaðsins 7. des. 1988 er enn ein ásannan um, at hesir menninir framvegis leggja alla orku í, at Fólkaflokkurin verður hildin uttan fyri alla politiska ávirkan framyvir. Og meðan henda menniskjagstranin heldur fram er deyðatøgn, ikki eitt kis hoyrist, og tann, sum tegur, hann samtykkir.

Ein kann spyrja seg sjálvan, hvussu leingi flokslæiðslan og teir, sum sita í nevnd Dagblaðsins lata seg tøla av blaðstjóranum og fulltrúa hansara. Er tann tíðin ikki komin, tá ábyrgdarmenn Fólkafloksins gera upp við seg sjálvar, um henda gongdin skal halda fram. Eitt mugu teir gera sær púra greitt, tað hvørkratak, sum Óli Breckmann við Dagblaðnum hevur á Fólkaflokkinum, kemur hann framhaldandi at brúka í mannajagstran sini, og sínar politisku undirlutakenslur fær hann so ongantíð mettaðar.

Ein sannroynd er tað, at meðan fólkafloksfólk runt landið harmast, heldur Dagblaðið fram við sini vamlisligu skriving, uttan at ábyrgdarmenn floksins lyfta hond frá síðu.

Koma ábyrgdarmenn Fólkafloksins framvegis at gera sum strutsurin og stinga høvdið niður í sandin fyri at sleppa undan konfrontatión við Óla Breckmann, so er bara at siga, sjálvgjørt er vælgjørt.

Frank Davidsen



DAGBLAÐIÐ

NR. 136 - 54. ÁRG. MIKUDAGUR 7. OKTOBER 1988 6 KRÓNUR

Gomul »lik« avdúkað á Tvøroyrar Flakavirki:

Whisky, palisander og BMW til Javnaðin

DAGBLAÐIÐ útaftur í morgin, valdagin

Orsakað av býráðsvalunum kemur eingi Dagblað út frigjadagin.

Í staðin kemur Dagblaðið útaftur longu í morgin, valdagin, høsdag 8. desember.

Næstu viku kemur Dagblaðið sum vant.

BLAÐSTJÓRNIN

Neyvan hava vit sæð fulari skriving í føroyskum blað sum dagin undan býa- og bygdaráðsvalunum 8. desember, tá Dagblaðið skuldsetir sjálvan løgmann fyri smugling og skrivar, at Suðringur hevur fingið bot fyri smugling. Hetta var so groft, at eisini fólkafloksmenn vóru í øðini um hetta, men eingin tordi at siga tað alment.

Valdagin er Dagblaðið og blaðstjóri tess, Óli Breckmann, so neytt til at koma við eini avsannan. Men tá er skaðin jú gjørdur og til tess at lesarin vónandi ikki skal siggja umberingina, verður hon sett inni í blaðnum millum lýsingarnar. Dagblaðið er so grunt, at istaðin fyri at taka alt aftur, so verður skrivað: »so burtursæð frá at vit taka orðini »smugling« og »stor sekt« aftur, so er øll greinin annars prógvast«.

Jumen, greinin snuðí seg jú bara um smugling og sektina og hvi skulu nú hesi orð braddliga standa í gásaeygum! Tað gjørdu tey ikki á forsíðu Dagblaðsins 7. desember.

Ju, soleiðis arbeiðir málgagnið hjá tí føroyska fólkaflokkinum. Prógvini hava vit her.

Áheitan til okkara politikarar:

Hjálpið okkum at minka um uttanlandsskuldina

Vit í Aksturvinnufelagi Samfylking hava fyrr alment vist á tað høpisleysa við verandi hýruvognstollið. Tað, sum málið í stuttum snýr seg um, er at hýruvognseigarar skulu gjalda toll, ið teir so fáa aftur eftir tveimum árum. T.d. fyri hýruvognseigarar í Havn er talan um einar 10 mió. kr. Hesir pengar verða allir lærdir uttanlands og so kemur sjálvandi rentan afturat.

Vit ynskja als ikki nakran pening frá landsstýrinum. Tað vit vilja er, at í staðin fyri at økja um uttanlandsskuld okkara, sum jú er so nógv umrødd í hesum tíðum, við púrt óneyðugum lánum —ja, so skuldi alt bert verið avgreitt beinanvegin, tá ið ein maður — ella kvinna — keypir sær hýruvogn. Á henda hátt sluppu vit undan at goldið ein toll, ið vit kortini fáa afturgoldnan eftir tveimum árum.

Teir, ið liva av hýruvognskoyring, áttu sjálvandi ikki at goldið toll, og nú vit hava fingið reglugerð lýsta viðvíkjandi hýruvognskoyring, skuldi tað verið rættiliga einfalt at skipa fyri, at so verður.

Føroyar eru einasta land í Europa, ið frmavegis letur hýruvognskoyrarar sínar gjalda toll av bilunum. Og av tí sama fara hvønn mánað um 3000 kr. (frá *hvørjum* hýruvognseigara) niður til Danmarkar — beinleiðis inn í danskar bankar. Var tað onkur, ið tosaði um uttanlandsskuld!!!

Samfylking vil við hesum vísa á tað óneyðuga — og tað órættvísa — við hýruvognstollium. Samstundis vísa vit myndugleikum okkara á ein møguleika, har teir kunnu gera nakað aktivt fyri at minka um uttanlandsskuldina.

Aksturvinnufelagið Samfylking

Mortan og Atli krevja avsannan

Atli Dam í telefonini og Mortan Johannesen í skrivi í dag krevja avsannað, at teir hava luttikið ella eiga nakran lut í smugling. Mortan Johannesen sigur soleiðis í brævi til Dagblaðið í dag:

Alt farið reguliga fram

Lágt riða tit á Dagblaðnum, tá tit í nevðini nú leggja eftir privatpersónum og leggja teir undir at vera við í smugling.

Tað er ikki óvanligt, at skip taka vørur við heim úr útlondunum. Hesar verða við komuna uppgivnar til tollvaldið og **tollavgreiddar.**

Undantikin er tann lítla rasjón, hvør av manningini kann taka í land sum »bonn«. Sum skipari á Suðringi skal eg vátta, at hvørt kolli er tollavgreitt, og fullur tollur rindaður. Eisini teir av tykkum nevndu persónar hava rindað fult út fyri sín part av hesum vørum.

Tað er ósatt, at Suðringur er komin undir sekt, meðan eg hevði skipið um hendi. Tvørturímóti høvdu vit gott samstarv við tollvaldið, sum hvønn túr fekk fullfiggjaðan tolllista útfílggjaðan við heimkomuna.

Eg ivist ikki í, at tollvaldið á Tvøroyri kann vátta hetta fyri Dagblaðnum. Eg krevji tí, at Dagblaðið hýsir hesi avsannan.

Atli Dam ringdi eisini á blaðið. Um hann fekk váttað, at einki prógv var fyri, at hann hevði luttikið í smugling, so var hann nøgdur. Hann vísti annars til tað sama sum Mortan nemur við.

VIDMERKINGAR

Sovitt vit hava fingið upplýst, er tað rætt, at Suðringur ikki er lagdur undir sekt fyri smugling. Heldur ikki skal Atli Dam persónliga leggjast undir smugling. Tí verður bíðið um umbering fyri.

Tann gleggi lesarin veit kortini, at túrurin, sum Dagblaðið vísti til í seinasta blaði, endaði í ruðuleika. Seks tollarar stóðu fyri Suðringi, tá hann kom aftur á Tvøroyri, og tollvaldið legði hald á tilsamans 586 fløskur av brennivíni.

Hóast Heri heitti á Mortan um at keypa bæði til sín, Signar og Atla, so hendi tað, at Mortan fór av í Týskalandi, og kom ikki upp við flogfari fyrrenn aftaná at Suðringur var komin. Tollvaldið metti tær 586 fløskurnar sum Føroyamet, og Mortan setti toltalbann móti rúsdrekka umborð á Suðringi sum revsing fyri, at manningin hevði svikið hansara álit.

Hvussu stóran part av teimum 586 fløskunum, Signar, Atli og Heri áttu, sigur søgan einki um. Á telexunum kunnu bert teljast tilsamans 48 fløskur til teir triggjar. Hinvegin upplýsti Tollstovan, at hald varð lagt á allar fløskurnar, sum bert vórðu latnar teimum aftur við framvísan av rúsdrekkakorti ella serloyvi. Serloyvi ella eykaloyvi kann ikki hava verið nakar trupulleiki at útvega úr landsstýrinum.

Málið doyði síðani burtur, og tað skilst, at eingin ákæra varð reist. So burtursæð frá at vit taka orðini »smugling« og »stór sekt« aftur, so er øll greinin annars prógvast.

blaðm.